Vit mugu berjast ímóti arbeiðsloysi

Roynt verður sum frægast, at meta um framtíðarútlitið hjá tí fólki, sum býr á hesum klettum. Hetta verður gjørt av ymsum stovnum og ráðgevandi nevndum, føroyiskum og donskum, og á Ólavsøku kemur so Løgmaður landsstýrisins vegna við síni frágreiðing.

Alt, sum sagt verður um framtíðina, kann bert vera met og ætlanir, tað fær ikki verði øðrvísi, serskakliga í hesum ótryggu tíðum. Tað er tó umráðandi at mett verður sum frægast um, hvussu útlitið er, fyri at tey, ið skipa skulu fyri á tí vinnuliga økinum bæði á sjógvi og á landi, betri fáa ætlað um, hvussu farast skal fram. Hetta ger seg ivaleyst galdandi á øllum samfelagsins økjum. Fólkið eigur at fáa at vita, at soleiðis sær samfelagsmyndin út, at soleiðis er støðan í veruleikanum.

Tað er tí ikki rætt at mála alt so ógvuliga ljóst, ella ikki ljósari enn tað í veruleikanum er, men tað er sanniliga heldur ikki rætt at seta upp ræður fyri fólkið. Bæði hesi bert skaða og gagna ongum. Tað hevur kenst nakað av ótryggleika yvir, hvussu vit fóru at koma burtur úr teimum trupuleikum, sum máttu koma av teimum broyttu umstøðum, bæði hvat í fiskileiðum og oljuprísum viðvíkur.

Stutt kann sigast, at vit eru vorðin fátækari enn undan farin ár. Skipini hava verið í fíggjarligum trupuleikum, og eru tað partvís enn. Her hava tiltøk verið sett í verk á løgtingi fyri at bøta um støðuna. »Tað má sláast fast, at vinnan má ganga, hon er lívsnervin í øllum samfeløgum og er tað í okkara við«.

Hvussu peningurin verður fingin til vega er óneyðugt at siga Føroya fólki. Meiri tollur og meiri skattur, samstundis sum prístalshækkingin varð tálmað, varð hildin aftur. Við tí politisku samansetingini á løgtingi tyktist hetta at vera einasta gongda leið fyri at fáa inntøku til landskassan. Ikki serliga

Jørgen Thomsen, løgtingsmaður skrivar:

populert vil onkur halda, rætt er tað. Tyngri og dýrari at liva, men samtíðis hugsi eg, at vit megu fegnast um, at vit í stóran mun hava hildið arbeiðsloysi niðri, og tað var tað, sum miðað varð ímóti við teimum sokallaðu kreppu-tiltøkunum, sum framd vórðu síðsta vetur, har ein samdur javnaðarflokkur tók undir.

Tað er neyvan nakað, sum er meira nívandi og oyðileggjandi fyri fólkið og samfelagið enn arbeiðsloysi.

Mong eru tey, ið kenna ta støðuna. Ikki nýtist at fara so mong ár aftur í tíðina, tá ið hetta nívdi arbeiðsmannin og fiskimannin við. Óttin fyri at einki fekst fyri tvinnar raskar hendur lúrdi altíð. So mátti leitast burtur í fremmand lond við teirra skipum ella eitt hvørt arbeiði á landi.

Tað er soleiðis, tá ið arbeiðsloysi ger seg galdandi, so er tað arbeiðara og fiskimanna stættin, ið fyrst kennir trupulleikarnir og neyðina av hesum, meðan tað eru nógv trygg arbeiðspláss við føstum størvum í einum skipaðum samfelagi. Hesi fólk koma tí ikki at kenna sviðan á sama hátt — hava ikki sama ótta og virðing fyri hesi ólýðandi neyð sum arbeiðsmaðurin og arbeiðskvinnan nátúrliga hava. Sjálvt um tað verður ásannað, at alt verður borið av slitmanna hondum.

Tað er gott, at sosialar veitingar eru, og tørvur er á eini arbeiðsloysisskipan, men tað sum er mest neyðugt er:ARBEIÐI TIL ALLAR HENDUR: Soleiðis at ikki gerst neyðugt við nøkrum arbeiðisloysisstudningi. Tað er hetta sum landsins politikkarar megu hava fyri eyga — royna av øllum alvi — at berjast ímóti arbeiðisloysi.

Hetta hevur altíð verið javnaðarfloksins stevnumið: ARBEIÐI TIL ALLAR HENDUR. Tú kanst hjálpa til her við at geva hesum flokki tína atkvøðu til valið.

Mugu fyribyrgja at vit koma í kreppu

JAVNAÐARFLOKKURIN MÆLIR TIL, at:

Allar inntøkur eiga at koma til skattingar —

Útbyggjan av bruttoskipanini —

Kelduskattaskipan má nú setast í verk —

Skattainnkrevjingin má gerast nógv effektivari.

Hetta vóru nøkur av teimum málum, sum javnaðarflokkurin í fjør vísti á sum treytir fyri at koma burturúr kreppuni, sum komin var inn á okkum. Javnaðarflokkurin segði tá, at føroyska samfelagið manglar til alla lukku tey fremstu eyðkenni fyri eini kreppu, t.d. arbeiðsloysi og útflutningstrupuleikar. Men flokkurin ásannar, at kreppa uttan um okkum er vandi fyri okkum, at henda kreppa fyrr ella seinri kann raka okkum — og tað ræður tí um at vera fyrivarin og seta í verk tiltøk, sum kunnu fyribyrgja, at henda ólukka rakar samfelag okkara.

Síðani hevur flokkruin fingið nakrar av tonkum sínum á hesi leið lógfestar, soleiðis at fiskifloti og vinna okkara kom aftur í eina betri fíggjarliga legu.

Tað eru serliga fyribrigdini arbeiðsloysi, undirskot á gjaldjavnanum og inflasjón, sum har eru at hugsa um.

Størstu vandamálini metir javnaðarflokkurin arbeiðsloysi og undirskot á gjaldjavnaum verða.

Størstu orsøkirnar til kreppu t.d. í Danmark og øðrum smærri ídnaðarlondum er støða teirra sum høgt specialiseraði ídnaðarlond, sum liva av hesum útflutningi. T.v.s. at tey útflyta einstáttaðar og sera høgt specialiseraðar vørur, sum fara til nøkur fá lond. Og tá kreppan rakar okkurt av útflytaralondunum, ja so rakar kreppan sera hart t.d. Danmark. Í Danmark og í líknandi londum royna stjórnirnar tí av øllum álvi at styrkja útflutningsídnaðin á tann hátt at minka um framleiðslukostnaðin í teirri vón at bøta um gjaldsjavnan og samstundis minka um arbeiðsloysið.

Heraftrat kemur so støðugt dýrkandi oljan, sum flestu lond noyðast at innflyta. Men tað er ikki einans oljan sum er orsøkin til kreppuna, tí prísirnir á ídnaðarvørum hava alla tíðina hækkað væl meira enn oljan.

Kreppan hjá vesturlendsku ídnaðarlondunum, serliga teimum smærru, stavar frá sølutrupuleikum — frá, at tey ikki sleppa av við sínar høgt specialiseraðu ídnaðarvørur.

Tiltøk sum stjórnirnar aðrastaðni hava sett í verk hava bøtt um støðuna, men kreppan herjar tó enn, helst tí at tað er eingin møguleiki hjá hesum londum at broyta sjálvt hitt kapitalistiska framleiðslumynstrið.

Kreppurnar rundan um okkum hava ført til stóra afturgongd fyri stóru fjøldina av fólkinum og hevur haraftrat ført til torfør politisk viðurskifti.

So er at spyrja hvat vit kunnu læra av øðrum, um vit hava lært av øðrum.

Nú er tað so, at okkara útflutningur er matvøra, fiskur. Ein vøra, sum vit útflyta meira ella minni viðgjørda. Líta vit at gongdini seinastu árini uttanum okkum, síggja vit, at tað ikki tykist sum henda útflutningsvøra er serliga meint rakt av kreppuni. Hetta hevur sjálvandi sína forkláring. Fiskur er ikki nøkur specialvøra. Tað er tvørturímóti ein vøra, sum at kalla øll lond hava brúk fyri, ein vøra, sum tað møguliga fer at vera minni og minni av. Samanumtikið tora vit at ganga út frá, at okkara útflutningsvøra er av einum slíkum slag, sum tað ikki fara at vera álvarsligir trupuleikar at sleppa av við. Her er altso ein avgerandi munur á okkara útflutningi og tí hjá teimum hart kreppuraktu londunum.

Okkara vinnulív er minni kompliserað minni specialiserað — hetta er ein fyrimunur.

Javnaðarflokkurin metir tað sum sína fremstu skyldu at gera tiltøk framhaldandi, sum kunnu fyribyrgja at vit koma í kreppu. Tað er greitt, at vit ofta kunnu koma í fíggjarligar trupuleikar, at partar av okkara fiskiflota og kanska virkir eisini kunnu kom í álvarsligar trupuleikar. Tað er Javnaðarflokkinum greitt.

Tí vil Javnaðarflokkurin síggja sum størstu politisku uppgávu sína í løtuni, at tryggjað verður framhaldandi arbeiði til allar hendur á sjógvi og á landi.

J. Lindenskov

»Topp 30«

Tilsamans 30 av teimum 318 uppstillaðu valevnunum við løgtingsvalið 1979 fingu fleiri enn 200 atkvøður. Tey eru hesi:

Pauli Ellefsen	770
Atli P. Dam	642
Erl. Patursson	542
Jógvan Sundstein	469
Óli Breckmann	469
Jógvan Olsen	447
Jákup Lindenskov	329
Signar Hansen	329
Finnbogi Isaksen	295
Jóhannes M. Olsen	273
Agnar Nielsen	270
Jógvan Durhuus	270
Flemm. Mikkelsen	269
Karin Kjølbro	266
Poul J. Olsen	263
Sverri Midjord	262
Hilmar Bech	260
Ivan Johannesen	254
Edmund í Garði	250
Ove Mikkelsen	251
Asbjørn Joensen	248
Niels P. Danielsen	239
Hilmar Kass	232
Vilh. Johannesen	229
Jona Henriksen	228
Jákup Mortensen	219
Andr. P. Jacobsen	216
Øssur D. Jacobsen	210
Petur Reinert	210
Hákun Djurhuus	204

Óli í Áarstovu

Sjálvandi mátti **Gamla** Sjálvstýri hava uppstillingarfund í **Gamla** Klubba.

— * —

Var tað Pauli E ella Annie Get your Gun, sum sang Every thing you can do, I can do better!!!

FLOKKALÝSING

Bræneggjaðir vóru teir, fólkaflokksmenninir, tá teir settu sær sum høvuðsmál at reka sambandið burtur úr øllum álitissessum her á landi. Hetta hendi í oktober 1950, sum teir í desember sama ár valdu sambands mann til løgmann!! Um henda flokk skrivaði »14. september« á einum sinni:

> **»Tað er eingin orsøk til at halda tað fyri løtuverk, at fólkaflokksins mikli tokki til Kristian Djurhuus er størri enn sambandsflokksins tokki til hansara. — Vit kunnu vera vísir í, at fólkaflokkurin altíð vil vera hálin í afturhaldsfylkingini mótvegis sonnum framburði — hitt afturhaldandi tjóðrið í tjóðarinnar rembing millum framburð og eldsløkking.«**